# Starvsfólk

## til útibarnagarð úti í Grøv

Klaksvíkar Kommuna er í ferð við at seta á stovn ein útibarnagarð úti í Grøv og søkir í hesum sambandi eftir starvsfólki.
Talan er um ein kommunalan ansingarstovn, har pláss verður fyri 40 børnum í aldrinum 3–7 ár.

***Søkt verður eftir:***

**Leiðara:**
Vit sóknast eftir leiðara / 40 tímar við námsfrøðiligari útbúgving.

**Námsfrøðingum:**
Vit sóknast eftir 3 námsfrøðingum / 40 tímar. Møguleiki er fyri at býta tímarnar øðrvísi.

**Hjálparfólki:**
Vit sóknast eftir 2 hjálparfólkum / 40 tímar. Møguleiki er fyri at býta tímarnar øðrvísi.

**Lønar- og setanartreytir** eru sambært sáttmálan millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

**Meiri fæst at vita** um størvini við at venda sær til Jóruna Niclasen samskipara ella Jancy Biskopstø Klein deildarleiðara á telefon 456388.

**Umsóknir**, saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu vera Klaksvíkar Kommunu, postboks 2, 700 Klaksvík í hendi **í seinasta lagi tann 31. mai 2002.**

**Klaksvíkar býráð**

# Skrivstovufólk

## til posthúsini í Tórshavn/Argir

Søkt verður eftir einum skrivstovufólki at arbeiða 1/2 tíð (40 tímar aðru hvørja viku) á posthúsunum í Tórshavn/Argir. Byrjast kann beinan vegin. Arbeiðstíðin kann liggja millum 07.30 og 20.30. Arbeitt verður mánadagar til fríggjadagar. Í fyrstu atløgu er talan um at arbeiða á posthúsinum á Argjum. Arbeiðstíðin har er 08.30 til 16.30. Talan verður fyrst um 3 mánaðar royndartíð við upplæring.

Arbeiðið fevnir um kassaavgreiðslu og vanligt postskrivstovuarbeiði.

Førleikakrøv: Minsta krav er FHS-útbúgving.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Postfelag.

Umsóknir skulu sendast til:

**Postverk Føroya**
Avgreiðsluleiðarin
Óðinshædd 2
110 Tórshavn

og verða okkum í hendi fyri 10. juni 2002.

Nærri fæst at vita mánadag – fríggjadag á tlf. 315562, lokal 138 (beinleiðis tlf.)

**Postverk Føroya**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Pedagogar søkjast

Býlingshúsið millum Gilja søkir eftir 3 pedagogum.

**Stovnslýsing**
Stovnurin er skipaður við tveimum barnagarðsstovum við 20 børnum í hvørjari og einari vøggustovu við 12 børnum.

**Størvini**
Talan er um:
- eitt starv 40 tímar í barnagarðsstovuni Látrinum at byrja 5. august
- eitt avloysarastarv í barnagarðsstovuni Látrinum fyri starvsfólk í barnsburðarfarloyvi frá 5. august til 15. oktober, møguliga til summarfrítíðina
- tvey størv 30 tímar í barnagarðsstovuni Rókini at byrja 5. august
- tvey størv 40 tímar í vøggustovuni Reiðrinum at byrja 5. august

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur ein stóran leiklut í gerandisdegnum, og stutt er burtur í haga og yvir til Svartafoss.

**Vit ynskja**
- at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgum
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt
- at tú ert førur fyri at taka avgerðir í arbeiði tínum

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya kommunala arbeiðsgevarafelag.

**Meiri fæst at vita**
við at seta teg í samband við Kirstin Djurhuus, leiðara, Jónu Guttesen, varðaleiðara tlf 318372 ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 315160 .

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsing um útbúgving og royndir skal vera Býlingshúsinum millum Gilja, postsmoga 3165, 188 Hoyvík í hendi í seinasta lagi mánadagin 10. juni 2002.

SNARSKIVAN

# Klassikari til sølu



YAMAHA XS650, árg. '71.

Er í sera góðum standi og koyrir gott.
Nýliga renoverað. Til sølu fyri kr. 32.000,–

**Tlf. (+45) 51844758 aftaná kl. 14.00**
**ella tlf. 219617 (kvøld/vikuskifti)**

# Verkfrøðingur

## til P/F Fjarhitafelagið

Í samband við menning av tekniska førleika felagsins, verður søkt eftir verkfrøðingi til P/F Fjarhitafelagið.
Starvið verður skipað við beinleiðis tilvísing til stjóra felagsins.

**Arbeiðsuppgávur**
Umframt vanligar rakstraruppgávur, fevnir starvið um:
- planlegging av útbyggingum og viðlíkahaldi
- samskifti við ráðgevarar
- umsjón við rakstri
- kundatænasta

**Førleiki**
- útbúgving sum maskinverkfrøðingur, ella tilsvarandi útbúgving
- góðan kunnleika til EDV
- góð samstarvsevni

Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarandi felag.

Umsókn verður at senda til P/F Fjarhitafelgið, postboks 3215, 110 Tórshavn, att.: Jóannes Hansen.

***P/F FJARHITAFELAGIÐ***
Brekkutún 1 – Hoyvík
Telefon 319559






# Arbeiðsfólk

## til urtagarðsarbeiði

Søkt verður eftir arbeiðsfólki við royndum og kunnleika til urtagarðsarbeiði, at byrja sum skjótast.

Vanligt koyrikort er ein fyrimunur.

**Símun Dalsgaard**
Boðanesgøta, Hoyvík
tlf. 282100 ella 315478


veitst tú ikki tað?
Sosialurin




TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Pedagogar / hjálparfólk til frítíðarskúlan í Eysturskúlanum

**Størvini eru:**
- tvey pedagogstørv/hjálparfólkastørv, 30 t.og 27 t. um vikuna
- eitt avloysarastarv í 4 mánaðir, frá 5. august til 29. november 2002, fyri hjálparfólk í farloyvi, 20 t. um vikuna.

**Stovnslýsing**
Frítíðarskúlin heldur til í A-lonini í Eysturskúlanum, har 42 børn hava sína dagligu gongd.

**Tað er týdningarmikið**
at tú:
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing, áliti og umsorgan fyri tí einstaka barninum
- kann hava eitt gott samstarv millum foreldur og starvsfólk.
- kanst arbeiða sjálvstøðugt, er røkin og førur fyri at taka avgerðir í arbeiðinum.

Vit leggja stóran dent á at skapa møguleika fyri, at børnini mennast - við at lurta, práta og vera saman við teimum. Við atliti til, at vit eru eitt frítíðartilboð fyri børnini.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett tann 5. august 2002, løn sambært sáttmála millum Føroya kommunala arbeiðsgevarafelag og Føroya pedagogfelag. Um pedagogar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað størv.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsing um útbúgving og royndir skal vera frítíðarskúlanum í Eysturskúlanum, Skúlagøta, FO-100 Tórshavn í hendi áðrenn 11. juni. Setanarsamrøður verða beint eftir 11. juni.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til: Barbaru Dahl, leiðara tlf. 314879 ella Katrina Petersen, samskipara tlf. 315160

SNARSKIVAN

**Mentamálastýrið**
*Fólkaskúladeildin*

# 2. varaskúlastjórastarv í Eysturskúlanum

Starvið sum 2. varaskúlastjóri í Eysturskúlanum verður lýst til setanar frá **1. august 2002.**

Skúlaárið 2002/2003 verða 615 næmingar í 10 árgangum í skúlanum. 46 lærarar starvast í skúlanum.

**Søkt verður eftir 2. varaskúlastjóra, sum**
- undir ábyrgd skúlastjórans og í samstarvi við varaskúlastjóran skal taka lut í teirri fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluni av virksemi skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg uppgávur í samstarvi við og eftir fyriskipan skúlastjórans.

**Harumframt skal 2. varaskúlastjórin**
- vera næstu medarbeiðari skúlastjórans og varaskúlastjórans
- saman við skúlastjóranum og varaskúlastjóranum átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- undir fráveru skúlastjórans/varaskúlastjórans hava ábyrgdina av leiðslu skúlans
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- saman við skúlastjóranum og varaskúlastjóranum skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálastýrinum í Streymoyar skúladømi III við fyribils tænastu í Eysturskúlanum, og tann, ið sett/-ur verður, eigur at tola broytingar um starvinum viðvíkjandi.

Starvið verður lønt í lønarflokkunum 30.2, 30.3 og 32.2 ella sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

**Umsóknir**
Umsókn, sum verður skrivað á oyðublað, ið fæst frá Mentamálastýrinum, skal vera Mentamálastýrinum í hendi ***í seinasta lagi hósdagin 6. juni 2002.***

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara.

**22. mai 2002**
**Mentamálastýrið**
**Hoyvíksvegur 72**
**Postrúm 3279 – 110 Tórshavn**
**Telefon 355050 – Fax 355055**
**e-postur: MMS@MMS.fo**

***Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*

# Aðalfundur

Aðalfundur Borðtennissambandsins verður leygardagin 8. juni 2002 kl. 11.00 í ÍSF-húsinum.

Skrá sambært lógunum.

**Nevndin**

# Hús í eysturbýnum til sølu

Byggiár: 1985
Stødd á sethúsum: 181 m²
Stødd á grundøki: 351 m²

Boð undir 1.400.000,- ongan áhuga.

Húsini standa sera væl fyri í barnavinarligum umhvørvi.

**Áhugað kunnu ringja tlf. 319368.**

# Móttøka

## á Hvíldarheiminum Naina

Av tí, at Katrin Dahl fer úr starvi sum fyristøðukvinna og Ása Kiærbech Olsen kemur í hennara stað, verður móttøka á Hvíldarheiminum:

***Hósdagin, hin 30. mai 2002 kl. 14.00 – 17.00***

Øll fyrrverandi og núverandi viðskiftafólk og starvsfólk, stýrislimir og annars vinir og kenningar eru vælkomin inn á gólvið

**Hvíldarheimið Naina**


veitst tú ikki tað?
Sosialurin



